# BILATORGIÐ

## Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag



**MAZDA PREMACY 2,0 TD**
Km 114.000. Kr. 138.000 – Turbo diesel, Air-con, Fløguspælara, el-rútar, el-spegl, fjarstýrt sentrallás v.m.



**OPEL ASTRA 1.8 STATIONCAR**
Árg okt. 95, Km 85.000. Kr. 76.000 – El-spegl, centrallás, sportsetur. Í góðum standi. Kr 65.000 uttan bil í býti.



**VOLVO S40 1.8**
Árg 2001, Km 55.000. Kr. 184.000 – Bl. Leðursetur, el-rútar- el-spegl, klima-anlegg, tokulyktir, spoilara aftan og framman, fartpilot, hæddarstilling av førarasetri, 16" alufelgur, Radio v/cd. Sera snøggur og lekkur bilur.



**NISSAN ECO T-100**
Árg des.1996, Km bert 35000. Kr. Nú: 79.000 + MVG – Sum nýggjur! Ger kvetti.



**VOLVO S40 2.0 AUT. GEAR**
Árg okt. 2000, Km einans 40.000. Kr. 178.000 – Fartpilot, air-condition, centrallás, el-rútar, el-spegl. Hita í setrum, hæddarstilling, alufelgur. Vetrardekk á alufelgum fylgja við. Verður seldur fyri kunda.



**RENAULT MEGANE STATIONCAR**
Árg dec. 99, Km 115.000. Kr. 115.000 – El-rútar, el-spegl, el-sóltak



**OPEL VECTRA, TURBO-DIESEL**
Árg aug. 1998, Km 119.000. Kr. 116.000 – El-rútar, el-spegl, hita í setrunum, CD, fjarstýrt sentrallás. Kr 96.000 uttan bil í býti.



**VOLVO 440, 1,8**
Árg 1996, Km 76.000. Kr. 89.000 – el-rútar, el-spegl, hita í setrunum, VOLVO sportfelgur, fjarstýrt sentrallás, spoilara aftan.



**VOLVO 440, 1,8**
Árg juni `96, Km 166.000. Kr. 58.000 – el-rútar, sentrallás, eyka sett av dekkum.



**VW PASSAT TDI**
Árg jan. 2002, Km 94.000. Kr. 229.000 – Automat gear, el-rútar, el-spegl, centralás, hæddarstilling av setrum framman.



**CITROEN JUMPER**
Árg 37073, Km 123.000. Kr. 129.000 v/mvg – El-rútar, el-spegl, alufelgur. Høgur og rúmligur bilur, sera góður til arbeiðsbrúk.



**FORD MONDEO**
Árg 2001, Km 21.000. Kr. 225.000 – El-rútar, el-spegl, el-sóltak, fartpilot, air-conditon, radio v/6 fløgum. Sera snøggur bilur. Nývirði 330.000.

**VOLVO 460, 1,8**
Árg sep. 95, Km 81.000. Kr. 75.000 – bl. Leðursetur, el-rútar, el-spegl, centrallás, hæddarstilling av førarasetri, hita í setrum. Sær gott út.



**MAZDA E2200 DIESEL**
Árg mai `97, Km 121.000. Kr. 79000 við MVG – Høgur. Sertilboð.



**GOLF TURBO DIESEL**
Árg okt ´1995, Km 214.000. Kr. 84.000 – El-sóltak, Remus-tuningsútstoyt, hæddarstillað førarasetur, v.m. Nýsýnaður.

VOLVO RENAULT

VR BILAR

Hoyvíksvegur
tel 322110






**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg Apr-98, Km 28.000. Sera vælhildin Top modell: Bert koyrt 28.000 km Klimaanlegg, Leðurinntrekk- Sóltak- El-rútar- El-spegl- Fj.stýrt Centrallás- Radio- Alufelgur-Spoylarar v.m. Sertilboð kr. 198.000.
Kr. 198.000.



**KIA SEPHIA II 1.5 SLX**
Árg Apr. 1999, Km 71.000. Elrútar. fr.- Valnød Instrumentbretti, Takboylar- Sleipikrók v.m. Kr. 86.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR. 4 HJÓLSTREKK**
Árg Mar- 98, Km 63.000. Bakkisensor - 4 WD v.Reduktiónsgear - Fjarstýrt centrallás- El-rútar- El-spegl- C.D.Anlegg v.m. Kr. 120.000.



**DAIHATSU CHARADE 1.0 5 HUR'AR**
Árg Jun-93, Km 79.000. Vælhildin: Nýsýnaður - Radio v.m. Kr. 35.000.



**KIA CARNIVAL 2.9 HPDI EX MODEL**
Árg Mar- 02, Km 195.000. Top modellið: Aircondition- Automatgear- Regnsensor- El. stýrt førarasetur- El rútar fr.+ aftan- El-spegl- Fjarstýrt centrallás- Hita í forrúti- C.D.anlegg- Mjørkal.- Leðurróður v.m. (Nýprísur: 325.800,-)
Kr. 218.000.



**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg Okt. 1997, Km 159.000. Elrútar. fr.- Valnød Instrumentbretti- Takboylar- Sleipikrók v.m. Kr. 58.000.



**NISSAN ALMERA 1.6 GX**
Árg Maj 1998, Km 61.900. Vælhildin: Alufelgur - Fjarstýrt centrallás - El-rútar - El-spegl v.m.
Kr. 108.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 06 Sept. 1995, Km 96.000. Centrallás- El-rútar- El-spegl- Radio v.bandspælara v.m. Eyka tectylviðgjørdur. Kr. 78.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Aircondition- Alufelgur- Fjarstýrt centrallás- El-rútar- El-spegl v.hita. C.D.Anlegg- Sleipikrók v.m. Kr. 158.000.

Pf. D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650



L/F Meginfelag Búnaðarmanna :

# – Vit eru sannførd um at skipanin fer at virka væl

**Í seinastuni hava fjølmiðlarnir víst áhuga fyri føroyskari mjólkarframleiðslu og tá serliga teimum umsetiligu mjólkarkvotunum, sum MBM hevur sett í gildi 20. mai í ár. Her skal gevast ein kunning um mjólkarkvoturnar og hvussu tær virka.**

TÍÐINDASKRIV
*L/F Meginfelag Búnaðarmanna*

MBM var stovnað í 1977 og byrjaði at taka ímóti mjólk í 1980. MBM er lutafelag, sum allir mjólkarframleiðarar í Føroyum eiga. Endamálið hjá virkinum hevur frá fyrsta degi verið at nøkta tørvin á mjólk og mjólkarúrdráttum í Føroyum, nakað sum eisini var politiskur málsetningur tá.

Í fyrstani var føroyska framleiðslan bara ein brotpartur av tørvinum. So við og við vaks tann føroyski parturin, og tá vit nærkaðust nítiárunum, var málið um at vera rokkið. Samstundis rakti kreppan okkum, og fólk í stórum tali fluttu av landinum, harav ein stórur partur var ungar familjur.

Fráflytingin gjørdi, at vit náddu framleiðsluloftið skjótari og knappligari enn framskrivingarnar høvdu víst. Framleiðslan gjørdist knappliga nógv størri enn sølan, og vit komu í tað óhepnu støðu, at noyðast at stoyta mjólk burtur. Fyri at sleppa burturúr hesum avgjørdi MBM at seta tiltøk í verk, soleiðis at vit ikki keyptu meira mjólk frá bøndrum enn vit kláraðu at selja. Hetta bleiv fyrsta kvotaskipanin.

Hendan skipanin var grundað á søgulig tøl har hvør bóndi fekk sína kvotu, sum hann mátti halda seg til. Tað var eingin møguleiki at broyta hana. Tað er eingin loyna, at fleiri bøndur komu í svárar fíggjarligar trupulleikar orsaka av kvotuni, serliga teir við nýggjum fjósum, har skuldin – sum rímiligt er – var størri. Stutt áðrenn kvotaskipanin var sett í gildi, var mjólkarstudningurin blivin skerdur, so fleiri bøndur sóu seg noyddar at økja um framleiðsluna fyri at framleiða seg burturúr fíggjartrupulleikunum, sum tá komu, men hesin møguleikin bleiv burtur, tá mjólkarkvoturnar komu.

Tað er okkum ein stór gáta, hví Jarðarráðið ikki tá beinanvegin gjørdi vart við sína ónøgd við kvotaskipanina og vísti á tann stóra tapsvandan hjá Jarðargrunninum, sum skipanin elvdi til. Tvørturímóti fingu bøndur, sum kærdu sína neyð fyri Jarðarráðnum og vildu hava teir at hjálpa sær at fáa eina meira hóskandi kvotu, tey boð, at Jarðarráðið fór ikki at hjálpa teimum við hesum. Jarðarráðið hevur sostatt øll hesi árini sitið tigandi og hugt at meðan skuldartrupulleikarnir gjørdust størri og størri.

## Nýggja umsetiliga kvotaskipanin

Tað er eyðsýnt, at kvota er darvandi fyri framleiðaran. Tann dugnaligi og dynamiski bóndin verður hildin aftur, missir áræði, og er í vanda fyri at støðga upp. Fyri at royna at loysa hendan trupulleikan og fyri at gera skipanina liðiligari, hava vit gjørt eina nýggja kvotaskipan, sum kom í gildi tann 20. mai í ár, har bóndur hava høvi til at handla kvotur sínámillum. Á henda hátt hava bøndur møguleika til sjálvir at tilpassa sína egnu mjólkarframleiðslu so hon hóskar betur til framleiðslumøguleikarnar á hvørjum einstøkum garði.

Meðan vit arbeiddu við tí umsetiligu kvotaskipanini, kom Kappingarráðið við ynski um at kvotaskipanin mátti gerast liðiligari. Hetta setti sjálvandi eitt skump í okkara arbeiði. Tá vit byrjaðu at arbeiða við at fyrireika umsetiliga kvotaskipan, var Jarðarráðið við á kunnandi fundi. Teir góvu seinni munnliga til kennar, at teir vóru ímóti slíkari skipan. Tí sóu vit onga orsøk vera til at hava teir við í hesum arbeiðinum. Vit komu her í ta heldur sjáldsomu støðu, at tvey ymisk ráð, vald av sama landsstýrismanni, høvdu hvør sína áskoðan á spurningin um umsetiligar kvotur.

## Tapsvandin hjá Jarðargrunninum

Útvarpið hevur upplýst frá stjóranum í Jarðarráðnum at 60 miljónir krónur standa í váða hjá Jarðargrunninum. Hetta er frá tíðini áðrenn kvoturnar gjørdust umsetiligar. Vit eru sannførdir um, at við nýggju umsetiligu kvotaskipanini er størri møguleiki fyri, at fjós, sum dragast við stóra skuld orsaka av ov lítlari framleiðslu, hava størri møguleikar fyri at gjalda skuldina aftur nú undir nýggju skipanini.

Mjólkarframleiðslan í Føroyum og í londunum rundanum okkum er nógv broytt seinastu árini og er í støðugari broyting. Av tí at mjólkarprísurin bæði í Føroyum og hinum londunum fellur støðugt í mun til aðrar prísir, noyðast mjólkarframleiðarar at økja um framleiðsluna fyri at halda inntøkuna á sama støði. Hetta ger at fjósini gerast størri og størri og framleiðararnir færri og færri. Tá Mjólkarvirkið byrjaði at taka ímóti mjólk í 1980 vóru 145 mjólkarframleiðarar í Føroyum. Í dag eru umleið 60 eftir. Vit vænta, at hendan gongdin heldur fram og tað merkir at um 20 ár vera bara einir 30 - 40 eftir, kanska nógv færri.

Hugsanin við okkara nýggju umsetiligu kvotaskipan er, at nú kann vinnan sjálv – og tað merkir bøndurnir – í sátt og semju royna at finna útav hvør skal gevast og hvør skal halda fram. Undir øllum umstøðum – við ella uttan kvotaskipan – hevur Jarðargrunnurin stórar avbjóðingar fyri framman tá talan er um skuldarumskipan, av tí at ein stórur partur av mjólkarframleiðarunum má gevast.

Vit hava hoyrt Útvarpið endurgeva stjóran í Jarðarráðnum fyri at siga at bóndur nú kunnu selja kvotuna og rýma frá einari stórari skuld, sum so ikki kann gjaldast aftur. Hetta vildi sjálvandi verið ómoralskt og í veruleikanum eitt lógarbrot. Hetta er ein álvarslig skuldseting móti fólkinum í einari heilari vinnu. Vit kenna føroyskar mjólkarframleiðarar sum erlig og álítandi fólk og hesa skuldsetingina meta vit sum teoretiska, og skuldi tað hent, at onkur fremur lógarbrot á hesum øki, so hava vit bæði ákæruvald og dómsvald, sum taka sær av slíkum málum eins og teir gera við onnur lógarbrot.

Vit eru sannførd um at skipanin fer at virka væl, men skuldi tað hent, at ávísar ábøtur eru neyðugar, fara vit at gera hesar.

Kollafjørður 15-06-2004

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM






Bilur + 2 fólk til Danmarkar
**úr 2.720,-**

**Føroyar – Danmark** ella hinvegin
Tórshavn – Hanstholm ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.720 | 3.200 | - | - | - | 4.320 |
| Bilur + 3 fólk | 3.580 | 4.300 | - | 5.110 | 5.530 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.440 | 5.400 | 6.080 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.300 | 6.500 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.720 | 4.160 | - | - | - | 5.800 |
| Bilur + 3 fólk | 4.780 | 5.440 | - | 6.820 | 7.420 | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.840 | 6.720 | 7.560 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 6.900 | 8.000 | - | - | - | - |



Bilur + 2 fólk til Noregs
**úr 1.960,-**

**Føroyar – Noreg** ella hinvegin
Tórshavn – Bergen ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.960 | 2.280 | - | - | - | 2.920 |
| Bilur + 3 fólk | 2.640 | 3.120 | - | 3.600 | 3.840 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.320 | 3.960 | 4.440 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.000 | 4.800 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.480 | 2.960 | - | - | - | 3.760 |
| Bilur + 3 fólk | 3.300 | 4.020 | - | 4.620 | 5.100 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.120 | 5.080 | 5.720 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.940 | 6.140 | - | - | - | - |



Bilur + 2 fólk til Hetlands
**úr 1.420,-**

**Føroyar – Hetland** ella hinvegin
Tórshavn – Lerwick ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.420 | 1.710 | - | - | - | 2.240 |
| Bilur + 3 fólk | 1.860 | 2.295 | - | 2.715 | 2.970 | |
| Bilur + 4 fólk | 2.300 | 2.880 | 3.280 | - | - | 3.940 |
| Bilur + 5 fólk | 2.740 | 3.465 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.880 | 2.240 | - | - | - | 2.900 |
| Bilur + 3 fólk | 2.460 | 3.000 | - | 3.480 | 3.810 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.040 | 3.760 | 4.160 | - | - | 5.080 |
| Bilur + 5 fólk | 3.620 | 4.520 | - | - | - | - |



Bilur + 2 fólk til Íslands
**úr 2.330,-**

**Føroyar – Ísland** ella hinvegin
Tórshavn – Seyðisfjörður ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.330 | 2.650 | - | - | - | 3.530 |
| Bilur + 3 fólk | 3.045 | 3.525 | - | 4.185 | 4.545 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.760 | 4.400 | 4.960 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.475 | 5.275 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.080 | 3.440 | - | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 4.020 | 4.560 | - | 5.460 | 5.940 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.960 | 5.680 | 6.480 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.900 | 6.800 | - | - | - | - |

Prísirnir í lágárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 7,0 m longd og 2,5 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

Prísirnir í háárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 5,0 m longd og 1,9 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

SMYRIL LINE